## Ísurin óvanliga nær landi

Hesa tíðina á árinum heldur íslendska vaktartænastan regluliga eyga við, hvussu havísurin norðan fyri Ísland háttar sær. Í gjár var eitt kanningarflogfar hjá tænastuni norðanfyri og kannaði umstøðurnar, og vísti tað seg, at havísurin er óvanliga nær landi. Í støðum var ísurin bara 18 fjórðingar úr landi. Tað óróhgvar kortini ikki tær vanligu siglingarleiðirnar. Veðurmenninir siga eisini frá vindi eystaneftir, og tí fer ísurin helst frá landi aftur.



*Havísurin er bara 18 fjórðingar norðan fyri Ísland (Mynd: Vísir)*

## Laksurin slapp út

Um vikuskiftið var illveður nógvastaðni á norsku vesturstrondini, og tað fekk millum annað avleiðingar fyri eina alistøð hjá felagnum Brilliant Fiskeoppdrett við Bømlo. Í tí nógva vindinum mánanáttina stóð so nógv á nótini, at hon skrædnaði, og stór hol kom á. Úrslitið varð, at 115.000 laksar sluppu til rýmingar. Myndugleikarnir bera ótta fyri, at tann rýmdi laksurin kann smitta annan laks, tí laksur hjá Brilliant Fiskeoppdrett hevur havt sjúkuna PD.

# Samkyndur maður myrdur



*Verkætlan Laramie kann lutvíst síggjast sum ein spegilsmynd av tí kjaki, sum seinasta hálvtannað árið er farið fram í Føroyum*

**Leikurin Verkætlan Laramie er eitt dokudrama um eina hending, sum skakaði alt USA: Søgan um morðið á Matthew Shepard, sum varð bukaður og myrdur, tí hann var samkyndur. Leikurin verður frumsýndur í Müllers Pakkhúsi sunnukvøldið**

LEIKLIST

*Lagt til rættis: Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Verkætlan Laramie er søgan um eina hatursbrotsgerð og eitt samfelag í sjálvsuppgerð. Ein ungur maður í lítla býnum Laramie, Wyoming, USA, verður so illa bukaður, at hann doyr av løstunum. Hendingin fær ikki einans avleiðingar fyri tann samkynda Matthew Shepard og ungu dreingirnar, ið framdu illgerðina. Hvør einasti íbúgvi í Laramie kemur í eina tvístøðu, har ikki slepst undan einari uppgerð við egið virðisgrundarlag - við samleika, sjálvsuppfatan, trúgv og spurningin um fólkaræði.

Hendingin skakaði alt USA. Søgan var í øllum teimum stóru amerikansku fjølmiðlunum og elvdi til eitt landsumfatandi kjak í USA um hatursbrotsgerðir.

### Søgan um morðið

Eina nátt í oktober 1998 varð 21 ára gamla Matthew Shephard bukaður og bundin í eitt hegn uttan fyri býin Laramie í Wyoming, USA. Matthew varð funnin á lívi, men var so illa viðfarin, at hann doyði á sjúkrahúsinum seks dagar seinni. Teir báðir brotsmenninir vórðu funnir og komu fyri rættin.

Íbúgvarnir í Laramie eru skelkaðir av hendingini. Fleiri av teimum hava í fyrstu atløgu ilt við at trúgva, at ein tílík brotsgerð kann fara fram í teirra lítla býi. Í fyrstu atløgu halda tey flestu eisini, at tað sjálvsagt er onkur fremmandur, sum hevur framt hesa óvanliga grovu brotsgerð.

Tað gerst tó skjótt greitt, at brotsmenninir eru tveir blaðungir menn úr Laramie, og at talan var um eina hatursbrotsgerð. Matthew Shepard bleiv bukaður og myrdur, tí hann var samkyndur.

Hesar avdúkingar, at tað vóru tveir av teirra egnu, elva til pínufulla sjálvrannsakan.

### Sjálvrannsakan

Tann veruleiki, at offrið er ein samkyndur maður, setir fokus á tað at verða samkyndur. Fólkið í Laramie er á einum máli um, at tað sjálvsagt er skeivt og ræðuligt at fremja eina tílíka brotsgerð. Eingin hevur uppiborið slíka viðferð, men hetta, at Matthew Shepard var samkyndur, og at talan var um eina hatursbrotsgerð avdúkar eisini, at nógvir av íbúgvunum í Laramie hava eina støðu til tað at vera samkyndur. Tey hava eina meining um, hvørt hetta er rætt ella skeivt. Av tí at kristindómur spælir ein stóran leiklut í Laramie, er tað fyri fleiri ein trúðarspurningur.

Málið um morðið á Matthew Shepard førir við sær, at fleiri av íbúgvunum fara at seta spurnartekin við teirra egnu virðir og livihátt.

Er tað rætt ella skeivt at verða samkyndur? Kann eg sum menniskja døma eitt annað menniskja? Kann eg yvirhøvur loyva mær at hava eina meining um tað er rætt ella skeivt? Er homoseksualtiteturein trúarspurningur?

At brotsmenninir ikki vóru fremmandir, men tveir av teirra egnu førir til at íbúgvarnir seta spurnartekin við tað umhvørvið, ið teirra børn vaksa upp í.

Katólski presturin í býnum heldur, at tey eiga at nýta hendingina til nakað konstruktivt - at lata brotsmenninar siga teirra søgu, so tey kunna læra av teimum, hvat ið tað var, sum gjørdi, at teir hesa náttina fóru út um alt mark.

Sum leikur fer, sodnar ræðuliga hendingin hjá fólki. Hvør í sínum lagi hevur sína hugsan um hendingina, og við leiklok eru íbúgvarnir vorðnir nøkur onnur menniskju, enn tá ið leikurin byrjaði.

### Fyrsta dokudrama í Føroyum

Stutt eftir hendingina fór sjónleikarabólkurin The Tectonic Theater Company undir leiðslu av Moisés Kaufmann til Laramie. Leikararnir fóru undir at gera samrøður við íbúgvarnar í býnum. Tey vendu regluliga aftur til Laramie í tvey ár og gjørdu meira enn 200 samrøður til samans. Sjónleikurin byggir á hesar samrøðurnar. Av tí at alt tilfarið í leikinum er skjalfestar heimildir og ikki fiktión, er leikurin eitt dokudrama, ein heimildarleikur. Hetta er fyrstu ferð eitt dokudrama verður spælt í Føroyum.

### Lóg uppkallað

Hendingin í Laramie skakaði ikki einans lokalsamfelagið Laramie, men sendi rembingar gjøgnum alt USA. Í september í ár, nýggju ár eftir morðið, samtykti amerikanska senatið, at eisini minnilutabólkarnir, tey samkyndu og tey brekaðu, verða fevnd av lóggávuni, sum skal verja móti hatursbrotsgerðum. Lógarbroytingin er uppkallað eftir Matthew Shepard og verður á mannamunni nevnd "The Matthew Sheppard act".

Leiklistin kann lýsa, hvussu vit menniskju ávirka hvønn annan og hvussu karmarnir í samfelagnum ávirka okkum og viðurskiftini okkara millum. Og Verkætlan Laramie kann lutvíst síggjast sum ein spegilsmynd av tí kjaki, sum seinasta hálvtannað árið er farið fram í Føroyum.

### Norðurlendsk verkætlan

Úr Danmark kemur leikstjórin Solveig Weinkouff og royndi ljóssniðgevin Lars Refshauge. Pallsniðgevingini stendur svenska Filippa Berglund fyri.

Ikki færri enn 54 leiklutir eru í leikinum. Hetta krevur nógv av leikarunum og tí er eitt sterkt og fjølbroytt lið av sjónleikarum savnað.

Úr Føroyum eru tað royndu yrkissjónleikararnir Egi Dam og Birita Mohr, umframt Gunnvá Zachariassen frá leikbólkinum Tvazz, og Hjálmar E. Dam, ið sum hin einasti, ikki er yrkisleikari. Marita Dalsgaard, sum býr í Danmark, er eisini við í leikinum, samstundis sum hon er leiðari av verkætlanini.

## FAKTA

**Leikhús Skift setur upp sjónleikin Verkætlan Laramie, ið verður frumsýndur í Müllers Pakkhúsi tann 25. november. Leikurin gongur hvørt kvøld kl. 19.30 til og við 12. dec.**